Sosialurin á vitjan í Finlandi

Birgir Waag Høgnesen • birgir@sosialurin.fo

# Jákup vísir Hó



*Her situr Jákup í samráðingum við stjóran á Sarins Båtar í Finlandi.*

**Í grein í seinastu viku høvdu vit samrøðu við stjóran á bátaverksmiðjuni Sarins Båtar, sum var sera fegin um samstarvið hann hevði við føroyingar.**

Á ferðini hitti Sosialurin eisini stjóran á føroyska virkinum Hógv í Søldarfyri, sum er kent fyri sínar føroyskt framleiddu ketlar til sethúsamarknaðin.

Vit hittu stjóran Jákup Olsen, á hugnaligu uppihaldsstovuni á hotel Kokkula í Finlandi.

Jákup sigur, at Hógv byrjaðið í Runavík í 1985, men tá við smærri umvælingar og annað innan vvs økið.

Eg arbeiddi einsamallur eina tíð, og hevði sum so ikki ætlanir um at seta nakað stórt í gongd, men eg fekk bara meir og meir at gera.

Í 1988 kom pápi mín Jafet Olsen ið hevði verið í fakinum í nógv ár, at arbeiða í fyritøkuni, og tá var farið undir meira fjølbroytt virksemi, sigur Jákup.

Pápi kendi so ótrúliga nógv fólk og kundar løgdust bara til hjá okkum og skjótt gjørdist greitt, at vit máttu velja hvørja leið vit skuldu ganga, antin at halda aftur ella fara hina leiðina, nevniliga